


www.oljan.fo

**Jan Müller** 09 - 07 - 2012

# Mærsk Drilling skal brúka 3000 oljufólk

At stórur tørvur er á fólki til olju- og frálandavinnuna í fleiri londum er eingin ivi um. Stóru útbyggingarnar av oljukeldum kring heimin seta stór krøv til manning. Nú um dagarnar boðaði Maersk Drilling, sum er eitt av heimsins leiðandi feløgum innan oljuboring, frá, at tørvur verður á at seta 3000 nýggjar medarbeiðarar komandi árini. Felagið byggir nevniliga fýra boriskip og 3 Jack-ups fyri umleið 20 milliardir krónur. Jesper Madsen frá Maersk Drilling sigur sambært Jyllands Posten, at 20% av manningini verða danir, meðan restin kemur úr øðrum londum. Hans Johannes á Brúgv, stjóri á Vinnuháskúlanum sigur við Dimmalætting, at tey á skúlanum er væl greið um støðuna á arbeiðsmarknaðinum og væntar eisini, at onkur á skúlanum fer tann vegin. Skúlin hevur seinnu árini sæð fleiri næmingar fara í oljuvinnuna at arbeiða tó serliga í Norra - og skúlin hevur ment seg við hesum í huga seinnu árini. Vinnuháskúlin hevur eisini í nógv ár havt gott samstarv við danska reiðaríið, sigur Hans Johannes á Brúgv við Dimmalætting. Hann ivast heldur ikki í, at ætlaninar hjá Maersk Drilling er ein møguleiki hjá nógvum føroyingum komandi árini eisini. Sum skilst hava allir 3 jack up's fingið kontraktir í Norra. Fyrsta boriskipið skal í Meksiko Golfin, ímeðan tey 3 seinastu ikki hava kontrakt enn.

